RUDDINGARDAGAR Í TÓRSHAVNAR KOMMUNU
2. og 7. mai

Rudda í náttúruni
Tá ruddingardagar eru fara øll út í náttúruna at rudda. Skótar, ítróttafeløg, skúlar, eigarafeløg, og onnur feløg stuðla hesum tiltaki við at rudda hvør sítt øki. Virkir, stovnar og haldilsrekandi rudda nærumhvørvið. Kort yvir økir eru at fáa í Snarskivuni, gomlu Brandstøðini á Varðagøtu, Endurnýtsluni ella á www.torshavn.fo.

Ruddingardagar verða:
Leygardagin 2. mai fyri eigarafeløg, skótar, ítróttafeløg o.o.

Hósdagin 7. mai fyri skúlar, barnagarðar, virkir, stovnar og handilsrekandi.

Kommunan heitir eisini á onnur um at rudda frí- og felagsøkir.

Rusksekkir fáast ókeypis á hesum støðum:
- Á gomlu Brandstøðini á Varðagøtu týs.-hós. kl. 8.00-15.00 og ley kl. 8.00-17.00
- á Endurnýtsluni á Hjalla, týs.-hós. kl. 8.00-17.00 og leyg. kl. 10.00-17.00
- í Kollafirði á bingjuplássinum mik. 17.00-20.00 og leyg. kl. 13.00-17.00
- Í Nólsoy á bingjuplássinum frá kl. frá 17.00-20.00 og leyg. 14.00-17.00

Bingjur standa á hesum økjum ley 2. mai:
Óðinshædd, Skálatrøð, Løgmannabreyt við skúlan, á parkeringsplássinum við Handilsskúlan, á parkeringsplássinum við Støðlagøtu á Argjum og í Havnardali.

Í Norðradali, Kaldbak, í Hesti, Kollafirði og á Velbastað verða posar lagdir við bingjurnar. Í Syðradali, Kaldbaksbotni, Koltri og á Sundi verða posar bornir út.

Í sambandi við ruddingardagarnar hjá kommununi kann ringjast til Reinhaldið hjá Tórshavnar kommunu á tlf. 254010, til Kollafjørð á tlf. 254003 og Nólsoy 214069.

Um ikki ber til at avhenda ruskposar á bingjuplássunum, ber til at venda sær til Tórshavnar kommunu á tlf. 254010 áðrenn kl. 16.00 og avtala, at posarnir verða settir fram við vegnum, soleiðis at Tórshavnar kommuna avhendar hesar.

Í sambandi við ruddingardagarnar kann ein venda sær til kommununa og boða frá, um størri burturkast frá náttúruni skal avhendast.

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



# Mc-Hár við Múrin!

**Festivalurin við Múrin avdúkar í dag, at "rapprokk" orkestrið Mc-Hár fer at framføra við Múrin**

Við Múrin sigur í tíðindaskrivi, at Mc-Hár altíð borgar fyri einari stuttligari og lívligari konsertupplivging.

Argandi og beinraknir tekstir saman við rokkandi rappi eru eyðmerki hjá bólkinum bæði á fløgum og á konsertum. Eisini tann visuelli parturin av pallframførslunum hevur altíð verið ein stórur partur av framførslunum, har nærum alt er loyvt og roynt!

Hvør minnist ikki hópin av bodypaintaðum og hálvnaknum kvinnum og monnum, ella tá bólkurin spældi í undirbuksum?

## Manningin

Tað eru tveir mans, ið øll árini hava skrivað bróðurpartin av ávíkavist tónleikinum og tekstunum. Teir eru keyboardleikarin Tróndur Bogason og rapparin Niels Uni Dam, sum báðir eru við í bólkinum enn. Restin av manningini hevur eisini verið rættiliga støðug seinnu árini. Bassleikarin Heri Reynheim kom uppí bólkin í 1996, Jónas Bloch Danielsen hevði verið fastur ljóðmaður hjá bólkinum í eitt ár, tá hann í 1997 bleiv gittarleikari í MC-Hár. Jens Virgar Jakobsen gjørdist gittarleikari í 1999, Rókur Jákupsson sang fyrstu ferð við í 2000, nýggjasti maður í bólkinum er Rani Hammershaimb Christiansen, sum byrjaði sum trummuleikari á allar fyrsta G!Festivalinum í 2002.

# Sunnleif Rasmussen skrivað verk til tónlistaskúlan Nordljóm

Flaggdagin fara tónar hjá blásarum, sangarum, gittarum og klaveri at ljóma sum ongantíð áður í Ítróttarhøllini á Eiði

Norðskála/Oyraskúli flaggar á 40. skúla ári, og tónlistaskúlin hjá Eiðis og Sunda Kommunu Nordljómur hevur 20 ár á baki. Til hetta høvið hevur Sunnleif Rasmussen skrivað verk til skúlarnir, ið nevnist "Sól".

Hans Andreas Djurhuus hevur yrkt "Har skínur sól á fjallatind" og "Sól er gull, hon gyllir hvønn teig". Við hesum føgru orðum og við tónum frá Sunnleifi, fer barnakór og Eiðis ljómfelag at frumframføra hetta nýggja verkið.

Flaggdagin verða bjóðað til konsert í Ítróttarhøllini á Eiði, og fer Sunnleif Rasmussen at greiða frá verkinum.

Hetta kvøldið verða eisini tvey sponsk verk framførd, ið Ferran Ferrer hevur skrivað.

Meira kend løg verða eisini at hoyra í Ítróttarhøllini, tá ið ungdómsorkestrið Nordljómur" fer at framføra løg sum Mamma Mia og Killing Me Softly. Anna Kristin Hansen fer, saman við øðrum, at framføra summar tónar á klaveri.

Sostatt er lagt upp til eitt sera fjølbroytt Flaggdagshald á Eiði.

